			Upprit	
Vegna	: Løgmansskrivstovuna	Dagf.	:	2025.05.15
Mál	: Suðuroyðartunnilin			
Evni	: Viðmerkingar til metingar av møguleikanum at bora Suðuroyartunnil úr Skúvoy	Arbeiðs-bólkur	:	Klæmint Eliasen, Eyðfinnur Lenvig, Jan Odmarsson Kim Krett Hansen, Jákup Marin Kjeld

1 Arbeiðssetningur og luttakarar

Løgmaður hevur á fundi í Tinganesi kl.10 tann 9. mai sett ein arbeiðsbólk til at viðmerkja metingarnar hjá p/f Suðuroyartunlinum um møguleikan eisini at bora Suðuroyartunnilin úr Skúvoy. Uppritið, sum skal viðmerkjast og metast um "20250507_Byggipláss í skúvoy_rev1.pdf", var móttikið saman við fundarinnkallingini, meðan sjálvur arbeiðssetningurin "Meting (Skúvoy).doc", var sendur bólkinum seinni kl.16.51 sama dag.

Arbeiðssetningurin her hesin:

- *Arbeiðsbólkurin skal gera viðmerkingar til uppritið frá p/f Suðuroyartunlinum um fyritreytir fyri og avleiðingar av at bora undirsjóvartunnil úr Skúvoynni. Sum part av arbeiðinum skal arbeiðs-bólkurin eisini geva tunnilsbólkinum(áhugabólkinum) møguleika at føra síni sjónarmið fram.*

Arbeiðsbólkurin er mannaður við Klæminti Eliasen, ið var settur sum skrivari, umframt Jan Odmarsson, Kim Krett Hansen, Jákupi Martin Kjeld og Eyðfinni Lenvig.

Arbeiðsbólkurin hevur givið áhugabólkinum og p/f Suðuroyartunnil møguleika at føra síni sjónarmið fram. Tað hevur p/f Suðuroyðartunnil gjørt á fundi við arbeiðsbólkin tann 12. mai, men áhugabólkurin ynskti ikki at taka av hesum møguleika, tí teir góðtaka ikki samansetingina av bólkinum.

Arbeiðsbólkurin fekk 3 arbeiðsdagar at arbeiða frá 12.mai til 14.mai, sum avmarkar nógv tað gransking, sum bólkurin hevði møguleika til at grunda sínar viðmerkingar og metingar á.

2 Óheftni

Klæmint Eliasen, Jákup Martin Kjeld, Eyðfinnur Lenvig og Jan Odmarson hava ikki verið partur av arbeiðinum at fyrireika Suðuroyartunnilin, men tað hevur Kim Krett Hansen og hetta, og var Løgmansskrivstovan kunnað um frammanundan. at bólkurin varð settur.

3 Viðmerkingar til upprit frá p/f Suðuroyartunnil um byggipláss í Skúvoy dagfest 7. mai 2025

Uppritið frá p/f Suðuroyartunnil um møguleikan at bora úr Skúvoy verður her viðmerkt undir somu yvirskriftum sum í uppritinum:

3.1 Byggipláss í Skúvoy

At umhvørvið í Skúvoy ikki er ein forðing fyri at hava byggipláss í Skúvoy, er ein neyðug fyritreyt.
Sum heild eru loyvir frá myndugleikunum ein avgerandi fortreyt fyri øll arbeiðsplássini, antin tey eru 2 ella 3 í tal,i og svar fæst ikki frá avvarandi myndugleika fyri umhvørvið, uttan fyrst at gera neyðugar árinskanningar og søkja formelt loyvi um hetta. Tað sama er galdandi fyri fornminnir. So vítt arbeiðsbólkurin veit, er hetta ikki gjørt enn.

Arbeiðsbólkurin metir, at byggiplássið kann og eigur at skipast soleiðis, at neyðugar veitingar fáast javnan til oynna og soleiðis, at tað kann virka hóast ókyrra í sjónum forðar fyri veitingum við skipi í nakrar dagar. Hetta er sum nevnt treytað av, at loyvi fæst til at gera arbeiðspláss, goymslu og havn við uppfylling við gróti út á sjógv.

3.2 Linjuføring Norðanfyri Múlan til Sandvíkar

Ongar aðrar viðmerkingar enn tær í broti 4.1.

3.3 Linjuføring úr Djúpadali til Sandvíkar

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at í mun til trygd og kostnað vigar tað tungt at gera undirsjóvartunnilin so stuttan sum gjørligt. Víst verður annars til viðmerkingar í broti 4.1.

3.4 Byggipláss í Skúvoy

3.4.1 Grót

Stórur partur av grótinum, sum fer at koma upp í Skúvoy, má brúkast til víðkan av byggiplássi og goymsluøki út á sjógv, so har verður gjørligt at goyma nógv grót, so at tørvur ikki er á at kunna sigla grót burtur hvønn dag við atliti til sjóvarilsku.
Neyðugt er helst at nýta elektroniskar tendrarar í staðin fyri Nonel, til tess at lúka krøvini hjá Umhvørvis-stovuni viðvíkjandi plastdálking fyri tað gróti, sum fyllast skal á sjógv.

3.4.2 Støddd av byggiplássi

Mett verður at 60.000 kvm er nøktandi støddd og at har eisini verður pláss til at goyma neyðuga nøgd av gróti, sum møguliga ikki kann siglast burtur so hvørt vegna sjóvarilsku.
Vísta staðsetingin millum bygdina og kirkjugarðin er skilagóð, men avgerandi spurningurin er um myndugleikanir geva loyvi. Gjørt verður vart við at fuglur eigur í bakkanum.
Atlit mugu eisini takast til tyrlpallin.

3.4.3 Ferja

Ein fraktferja áleið sum Sam skal vera tøk alt árið, men arbeiðshavn og byggipláss skal skipast, so tað kann virka hóast at fraktferjan vegna sjóvarilsku ikki fær siglt nakrar dagar og somuleiðis neyðtilbúgving. Um hendan ferja kann siglast av somu manning, sum siglir verandi leið, hevði hetta kvinka nevnda kostna niður.

3.4.4 Grótskip

Nevnda havgangandi skip verður mett hóskandi og ikki splittlektari, men tað ella tey tørva ikki at sigla hvønn dag, um nóg stór grótgoymsla verður skipað á økinum, sum góður møguleiki skuldi veri fyri. Táið siglingin kann skipast uttan krav um at skula sigla hvønn dag ella vera standby, so er sannlíkt at hetta kann gerast fyri helvtar prís.
Táið hol er í gjøgnum tunlarnar kann partur av grótinum koyrast burtur á bili.

3.4.5 Havnaranlegg

Viðvíkjandi havnaranleggi skal havast í huga:

- at neyðuga arbeiðshavnin er eitt arbeiðsanlegg og ikki eitt permanent anlegg. Hetta hevur týdning fyri hvussu nógv verju grót er neyðugt.
- at eitt anlegg, sum skal standa í stytri tíð, kann dimensionerast fyri lægri aldu enn 50-árs alda. Tað fyriliggur ein aldu- og streymkanning fyri økið frá 2005 frá DHI, sum kann brúkast.
- at neyðugt er ikki at sigla hvønn dag við fraktferjuni(Sam), og at grótskipið kann leggja sína sigling til rættis eftir veðrinum. Hetta avmarkar krøvini til arbeiðshavnina
- At amboð og tilfar er støðugt til taks á økinum til at gera umvælingar, um skaði verður.

Undir atlitið til hetta verður ein kostnaður uppá í mesta lagi 100mió kr mettur realistiskur.
Arbeiðshavn til fraktferjuna(Sam) má gerast áðrenn tunnilsarbeiðið fer í gongd, meðan restin av arbeiðshavnini verður gjørd so hvørt grót er tøkt frá tunlinum. Fyribils arbeiðshavnin til fraktferjuna kann helst gerast uppá einar 3 mánaðir.

3.5 Byggitíð til spreinging av tunlinum

Mett verður ikki at tilrigging í Skúvoy tørvar at taka nógv longri tíð enn í Sandvík og Djúpadali og annars av góðum royndum eiga slík arbeiðir at vera gjørd áðrenn tunnilsarbeiðið byrjar.
At byrja eitt tunnilsarbeiðið hevur nógvar avbjóðingar við sær og tí er ikki vanligt og heldur ikki neyðugt at byrja fleiri slík júst samstundis. Hetta ger tað trupult at gera samanlíkning. Fyri trygdina er betur at samskipa nær tunnilsarbeiðini byrja, soleiðs at teinurin frá tunnilsbeni har sprongt verður og út ikki verður longri enn allar hægst neyðugt. Tað sær út til at bera til spreinga tunnilin í gjøgnum 8 mánaðir fyrr samstundis sum longsta strekkið niður til tunnilsbenið verður avmarkað til 10km. Hetta kann enntá avmarkast til knappar 9km, men tá tekur tunnilin longri tíð at spreingja heldur enn styttri.

3.5.1 Byggitíð frá Múlanum við byggiplássi í Skúvoy

Somu viðmerkingar sum til 3.5.

3.5.2 Byggitíð úr Djúpadali við byggiplássi í Skúvoy

Somu viðmerkingar sum til 3.5.

3.6 Mettur meirkostnaður í mun til tunnil úr Djúpadali

Meirkostnaður sambært p/f Suðuroyartunnil fyri loysn hjá áhugabólki			**Viðmerkingar frá arbeiðsbólki**			
		Bæði íbinding í Skúvoy og tunnil undir Sands bygd		**Bara íbinding í Skúvoy við**	**Bara tunnil undir Sands bygd**	**Bæði íbinding í Skúvoy og tunnil undir Sands bygd**
Tunnil hjá áhugabólkinum	153.000kr/m x 3.200 m	490 Mkr	Møguliga heldur meir vegna spreinging undir bygt øki.		≈490 Mkr	≈490 Mkr
Tunnil til Skúvoy	153.000kr/m x 2.180 m	334 Mkr	Onga viðmerking.	≈334 Mkr		≈334 Mkr
Vegur frá tunli hjá áhugabólkinum til Sandoyartunnilin	20.000kr/m x 2.000 m	40 Mkr	Onga viðmerking.		≈40 Mkr	≈40 Mkr
Flutningur av gróti til Skopunar. Skopunar kommuna má sjálv leggja út og brimverja		≈ 40 Mkr	Onga viðmerking.		≈40 Mkr	≈40 Mkr
Havn í Skúvoy		≈ 100-200 Mkr	Mett verður at arbeiðshavn kann byggjast, røkjast og takast burtur fyri 100 Mkr.	≈100Mkr		≈100Mkr
Ferja		≈ 20 Mkr	Onga viðmerking	≈20 Mkr		≈20 Mkr
Drift av ferju í 4 ár		≈ 40 Mkr	Kann kanska fáast niður í helvt við at brúka somu manning, sum hin leiðin og saman við møguliga styttari byggitíð	≈20 Mkr		≈40 Mkr
Sigla grót í 3 ár		≈ 100 Mkr	Mett verður at 50 Mkr er realistiskt.	≈50 Mkr		≈50 Mkr
Sandslíð smb. Samferðsluætlan. Má gerast undir øllum umstøðum.		50 Mkr	Onga viðmerking annað enn at hetta kann møguliga útsetast.		≈50 Mkr	≈50 Mkr
Uppstigan av vegi gjøgnum Sandsbygd til tungu ferðsluna til Eystanbygdirnar	20.000kr/m x 3.000 m	60 Mkr	Onga viðmerking annað enn at hetta kann møguliga útsetast.		≈60 Mkr	≈60 Mkr
Sparing av drift av Smyrli í 7 mánaðir		≈ -50Mkr	Um fyrireiking av arbeiðshavn og byggiplássum verður gjørd frammanundan, kann sparingin vera nærri tveimum árum. Tað eru ymsar røddir frammi um hvat rakstur av Smyril og Sildberin í veruleikanum kosta árliga og hetta eigur at vera staðfest meiri neyvt, men sambært fíggingarleistinum er sparingin 127Mkr árliga fyri Smyril og 5Mkr fyri Sildberan svarandi til 264Mkr í tvey ár. Tað manglar at taka sparing av byggiplásssi við fyri stytta byggitíð. Vit meta at tað er minst 80 Mkr fyri tvey ár.	≈-344Mkr		≈-344Mkr
Íalt		**1.224-1.324 Mkr**		**≈180 Mkr**	**≈680 Mkr**	**≈860 Mkr**
Sparingar í mun til at byrja í Djúpadali						
Suðuroyartunnilin – Líðarendi	20.000kr/m x 4.500 m	-90 Mkr	Onga viðmerking.		-90 Mkr	-90 Mkr
Líðarendi – Sandoyartunnilin	20.000kr/m x 7.500 m	-150 Mkr	Onga viðmerking.		-150 Mkr	-150 Mkr
Møguligt krav um at koyra grót aðrastaðni		-70 Mkr	Ok, men hetta hava vit onki innlit í.		-70 Mkr	-70 Mkr
Í alt		**-310 Mkr**			**-310 Mkr**	**-310 Mkr**
Meirkostnaður		**914 - 1.014 Mkr**		**≈180 Mkr**	**≈370Mkr**	**≈550Mkr**

Gev gætur at 370 mió. kr fara til tunnil undir Sandsbygd. Tunnilin niður frá Skúvoy umleið 524 mió. kr men hendan eykaútreiðsla kann vera partvís spard innaftur í styttari byggitíð til 180 mió. kr.

3.7 Samanumtikið

Greiða á umhvørvisspurninginum fæst bert við at gera árinskanning og søkja formelt um loyvir frá Umhvørvisstovuni, sum arbeiðsbólkinum kunnugt ikki er gjørt enn.
Trupul atkomuviðurskiftir kunnu loysast, men kosta pening, sum mett er um í hesum uppriti.
Arbeiðsbólkurin metir, at projektvágin fer niður heldur enn upp við tunli niður frá Skúgvoynni, táið hugsað verður:

- At tað gevur ein eyka rýmingarleið mitt í tunlinum.
- At tað gevur øktar møguleikar fyri at loysa møgulig trupul jarðfrøðilig viðurskiftir frá tveimum síðum.
- At tað gevur møguleika fyri at avmarka longdina inn til tunnilsbenið, har sprongt verður.
- At fyrireika byggipláss og gera forskeringar frammanundan lækkar projektvágan.

Arbeiðið at gera tunnil undir Sandsbygd kostar verkætlanini umleið 370 mió kr., og ein breiður, flatur tunnil niður frá Skúvoy kostar umleið 524mió – men hetta seinna minkar til 180 mió, táið atlit verður tikið til eina sparing uppá 344 mió kr. vegna stytta byggitíð.

Tilriggingin í Skúvoy tekur neyvan hálvtannað ár men kanska heldur hálvt ár um hon verður gjørd í fasum.

Tað er ein greiður meirkostnaður av at fara niður í Skúgvi, sum tó minkar munandi, táið atlit verður tikið fyri styttari byggitíð. Umframt hetta metir arbeiðsbólkurin sum omanfyri nevnt, at hetta kann gagna trygdini og váganum í verkætlanini.

Loyvi frá myndugleikum til at arbeiða í Skúvoy er fullkomuliga avgerandi fyri at bora tunnil frá Skúvoy.

Mælt verður til at taka útreiðslur av burturtøku av havnaanleggi við.

Egintilbúgving kann supplerast við tyrluflutningi.

Arbeiði í Skúvoy eigur sjálvandi at byrja á vári so tað er væl ávegis áðrenn veturin kemur.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini frá at taka kjansir og velja ótryggarloysnir.

4 Uppskotið hjá áhugabólkinum

Áhugabólkurin ynskti ikki at møta á fundi við arbeiðsbólkin og hevur heldur ikki útflýggjað arbeiðsbólkinum nakað tilfar - annað enn tað sum liggur sum fylgiskjal 60 við lógaruppskotinum. Tí vera viðmerkingar gjørdar til tíðindaskriv/facebook-skriv tann 11. mai 2025 frá áhugabólkinum har teir stutt taka samanum síni sjónarmið. Við tað at skrivið ongar yvirskriftir hevur, hava vit sett hóskandi yvirskriftir á niðanfyri til tess at býta tekstin upp.

4.1 Boring frá trimum støðum – skjótari framdrift

Arbeiðsbólkurin er samdur í, at har er ein møgulig tíðarsparing við at spreingja frá trimum stuffum heldur enn tveimum. Men hvat tíðarsparingin í veruleikanum vísir seg at vera, avhongur av ymsum fortreytum. Í metingini hjá áhugabólkinum fyri egið uppskot hava teir onga tíð sett av til at fyrireika byggipláss í Skúvoy, meðan P/f Suðuroyartunnil harafturímóti hevur sett hálvtannað ár av teimum tveimum spardu til at fyrireika arbeiðshavn og byggipláss. Arbeiðsbólkurin metir, at hálvt ár til at fyrireika byggipláss og arbeiðshavn í Skúvoy er meiri realistiskt og metir, at hetta kann gerast frammanundan at tunnilsarbeiðið byrjar.

Tíðarsparingin uppá tvey ár er lutvíst grunda á, at tunnil verður sprongdur frá trimum støðum við veksildrift heldur enn tveimum, og lutvíst á, at Sandur-Skúvoyartunnilin verður sprongdur í gjøgnum fyrst, so grót frá víðari spreinging mót Sandvík kann takast upp í Skúvoy – fyri at liðugtgerðin av Sandur-Skúvoyartunlinum kann byrja, meðan restin av tunlinum móti Sandvík verður sprongdur. Hetta er ein greiður fyrimunur fyri tíðarætlanina og møguliga eisini fyri trygdina. Vit meta at hesin partur av uppskotinum hjá áhugabólkinum kundi somuleiðis veri gagnligur fyri linjuna frá Djúpadali, um breiður og flatur tunnil verður sprongdur niður frá Skúvoy.

Spurningurin um hóskandi tunnil upp í Skúvoy kann gagna trygdini í verkætlanini og spurningarnir um tunnilin skal leggjast undir Sandsbygd eru tveir ymiskir spurningar. Tað ber jú til at gera víðan og flatan tunnil niður frá Skúvoy til gagns fyri trygdina í høvuðstunlinum, hóast tunnilslinjan liggur stytsta veg frá Djúpadali. Spurningurin um vegaføring framvið ella undir Sandsbygd er ein annar spurningur. Ein slíkur tunnil niður frá Skúvoy ger tað teoretiskt møguligt at avmarka teinin frá tunnilsopi og inn til benið, har borað verður til 9,0km mótvegis 11,4km fyri uttan hendan eyka tunnil. Hetta vil tó longja tíðina at spreingja tunnilin við næstan einum ári í mun til linjuna við tveimum 11,4km longum stuffun frá ávíkavist Djúpadali og Sandvík. Tess longri teinur niður til stuff verður góðtikin, tess styttri verður byggitíðin. Arbeiðsbólkurin metir, at breiður og flatur tunnil niður úr Skúvoy kann gagna trygdini, og arbeiðsbólkurin mælir til hetta verður kannað nærri, tí tað sæst ikki í tilfarinum, um hetta er blivið kannað fyri annað enn tann tronga og reysta tunnilin upp í Skúvoy.

Hetta ger tað trupult at gera samanlíkning. Yvirskipað kann tó sigast, at fyri trygdina er betur, at samskipa nær tunnilsarbeiðini byrja, soleiðs at longdin frá tunnilsbeni har sprongt verður og út ikki verður longri enn allar hægst neyðugt. Tað sær út til at bera til at spreinga tunnilin í gjøgnum 8 mánaðir fyrr, samstundis sum longsta strekkið niður til tunnilsbenið verður avmarkað til 10km. Hetta kann sum nevnt enntá avmarkast til 9km, men tá tekur tað longri tíð at spreingja tunnilin, tí drálast má við at byrja í Sandvík.

4.2 Fyrimunir

Áhugabólkur nevnir nakrar fyrimunir við teirra loysn, sum vit her fara at viðmerkja:

- Skjótari farleið.
  Tað er ongin ivi um, at hendan leiðin til Suðuroyar er 6km styttri, sum tekur knappar 5min at koyra. Tað er eisini ein lægri liggjandi farleið og tí betri á vetrartíð.
- Liðug knøpp tvey ár fyrr enn Djúpadalsloysnin
  Tað er møguligt at gera tunnilin upp til tvey ár fyrr lidnan, um fyrireikandi arbeiðini vera gjørd frammanundan. Hesin møguleiki er somuleiðs galdandi fyri Djúpadalsloysnina.
- Minni váða við styttri teini frá tunnilmunna og inn til benið, har borað verður
  Við tunli niður frá Skúvoy er tað møguligt at avmarkað teinin frá tunnilsmunna og inn til benið har sprongt verður til 9km. Tess longri teinur niður til tunnilsbenið verður góðtikin, tess styttri verður byggitíðin. Hesin møguleiki er somuleiðis galdandi fyri Djúpadalsloysnina.
  Tað tykist, sum teinurin frá tunnilsmunna og inn til tunnilsbenið, har borað verður, verður góðar 10 km í loysnini, sum er víst í animatiónini.
- Við boring á 5 stuffum er minni váði fyri seinkingum
  Hesum er arbeiðsbólkurin yvirskipað samdur í og vísir samstundis á fyrimunin við at kunna loysa eina geologiskt trupla støðu frá tveimum síðum.
- Minni váða við styttri tunlum undir sjónum.
  Hesum er arbeiðsbólkurin yvirskipað samdur í, men víst verður tó á, at partur av tunlinum frá Sandi liggur ovarlaga móti lendinum fram við einum vatni, og tí við størri váða fyri leka umframt, at injektión ikki er so løtt at gera tætt at lendinum.
- Jarðfrøðiligir fyrimunir við linjuføringini umvegis Skúvoy
  Tað sær út til at vera fyrimunir og vansar við báðum loysnum. Tað er ein fyrmunur at tunnilin verður lagdur nær við veruligar boringar frá landi í Skúvoy, men Djúpadalsloysnin hevur ein annan fyrimun við liggja minni parallelt við flágirnar enn loysnin av Sandi. Djúpadalsloysnin kann fáa sama fyrimun av at koma upp í Skúvoy.
- Bestu, tryggastu og mest kostnaðareffektivu loysnina fyri brúkaran og samfelagið
  Arbeiðsbólkurin hevur ikki møguleika til at meta neyvt um hetta páhald uppá so stutta tíð, men vísir til tær eygleiðingar, sum gjørdar eru í hesum uppritið um ymsar fyrimunir og vansar. Víst verður eisini til frágreiðingingar hjá Landsverk um hesi viðurskiftir.
- Betri umhvørvisliga enn Djúpadalsloysnin.
  Arbeiðsbólkurin hevur ikki møguleika til at meta neyvt um hetta páhald uppá so stutta tíð, men vísir til tey inntriv sum vera gjørd í Skúvoy, og at byggipláss tætt at Sandsvatni førir við sær størri vanda fyri útláti og dálking av vatninum – um enn hetta helst kann forðast við serligum átøkum.

4.3 Visión

Uppá so stutta tíð hevur arbeiðsbólkurin ikki møguleika til at meta neyvt um tað páhaldi at loysnin frá Sandi er tann besta, tryggasta og mest kostnaðareffektiva, men vísir til tær eygleiðingar, sum gjørdar eru í hesum uppritið og øðrum álitum um ymsar fyrimunir og vansar.

5 Vágametingar

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at serfrøðingar hava gjørt fleiri ymsar váðametingar, og tað ber ikki til upp á so stutta tíð at meta um hesar. Men arbeiðsbólkurin metir tað at vera álitisvekjandi, at tað fyriliggur ein "second opinion" frá serfrøðingi viðvíkjandi vágametingunum, sum yvirskipað tekur undir við loysnini, hóast hann hevur týdningarmiklar viðmerkingar og atfinningar til tær. Sum náttúrligt er, eiga hesar at vera nágreinaðar meiri í næsta stigi. Tó undrast arbeiðsbólkurin á páhaldi, um at ein rýmingarleið upp í Skúvoy ikki skal vera til gagns fyri trygdina, og mælir til at hetta verður kannað nærri, tí loysnin við einum breiðum flatum tunli niður frá Skúvoy, tykist ikki vera viðgjørd í nakrari váðameting enn.

6 Niðurstøða

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er bæði gjørligt og ráðiligt at gera ein breiðan, flatan tunnil niður úr Skúvoy, og metir at hetta helst kann stytta byggitíðina av Suðuroyartunlinum heilt fitt, so tað vegna tær sparingar sum knýta seg at hesum samlað sæð ikki verður serliga nógv dýrari at knýta Skúvoynna uppí, sum annars kostar umleið góða hálva milliard krónur, sum tó vegna sparing av styttari byggitíð verður 180 mió kr.

Umframt hetta kann ein breiður, flatur tunnil niður úr Skúvoy veita eyka trygd undir arbeiðinum í mun til tað, at tað gert møguligt at stytta longsta tein inn til tunnilsbenið, har sprongt verður til 9 ella 10km . Hetta er bæði galdandi fyri loysnina frá Sandi og frá Djúpadali. Møguliga kann rýmingarleið gjøgnum breiðan, flatan tunnil niður úr Skúvoy eisini betra um trygdina í endaliga tunlinum, sum tí eigur at vera kannað betri, enn tað higartil er kannað fyri ein smalan, reystan tunnil upp í Skúvoy.

Tunnil undir Sandsbygd er eitt annað mál, sum fyri umleið einar 370 miliónir krónir gevur eina heldur betri samlaða farleið til Havnar og fram við Sandsbygd.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at øll tunnilsinnsløg, tilhoyrdandi byggiøkir og atkomuvegir vera gjørd frammanundan og eisini fyribils arbeiðshavn til ferjuna í hóskandi tíð.

Aðrir fyrimunir og vansar kunnu lesast í uppritinum omanfyri har arbeiðbólkurin hevur gjørt viðmerkar til uppritið frá p/f Suðuroyartunnil og til tíðindaskrivið frá áhugabólkinum, sum ikki vildi møta á fundi.

At umhvørvi í Skúvoy ikki er í vegin fyri at hava byggipláss í Skúvoy, er ein neyðug fyritreyt. Hetta mál er ikki avklárað við Umhvørvisstovuna enn og hon kann ikki geva nakað loyvi ella viðmæli fyrr enn søkt er um hetta og neyðug árinskanning gjørd.